tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.11.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 78/23 | 23/00366-2 | Suðuroyar barnaverndartænasta -fíggjarætlan FÆ2024 |
| 79/23 | 23/00308-1 | Fíggjarætlan 2024 |
| 80/23 | 21/00593-3 | Uppskot til reglugerð í sambandi við útleigan av ítróttarhúsinum við Stórá |
| 81/23 | 23/00363-1 | ALS -hølir til samrøður |
| 82/23 | 21/00027-5 | Dugni í Suðuroy |
| 83/23 | 23/00364-2 | FSR -viðv. stuðulsavtaluni frá 15.10.2021 -útgjald |
| 84/23 | 23/00370-2 | SEV -kallar til eykaaðalfund 8. desember 2023 |
| **Til kunningar** | | |
| 23/23 | 23/00077-2 | Staðseting av fongsul -fyrisp. frá Løgmáláraðnum |
| 24/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| | | |

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag 30. november 2023 og spyr um viðmerkingar eru til hesa.

Kristina Roest viðmerkir og mælir til, at mál nr. 23/00356_"FSR stuðul til venjingarlegu" verður viðgjørt sum lukka mál -einmælt samtykt.

Tess vegna var fundurin niðurlagdur í uml. 10. min, har mál nr. 23/00356_"FSR stuðul til venjingarlegu" var tikið av almennu fundarskránni.

Til støðutakan

## 78/23
## 23/00366-2 Suðuroyar barnaverndartænasta -fíggjarætlan FÆ2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 83/23 |
| 2 Býráðið | 30.11.2023 | 78/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.11.2024**
Leiðarin av Suðuroyar barnaverndartænastu hevur sent kommununum í samstarvinum fíggjarætlan fyri 2024.

*Herviđ viđsent fíggjarætlan fyri 2024 hjá Suðuroyar Barnaverndartænastu og yvirlit yvir býti av kostnaðinum. Stýrið fyri Suðuroyar barnaverndartænastu hevur á fundi 21.11.2023 gjøgnumgingið og tikið undir við fíggjarætlanini fyri 2024.*

| Kommuna: | Fólkatal nov. 2023 | Kostnaður 2024 | |
|---|---|---|---|
| Tvøroyri | 1.735 | 37,72% | 3.358.619,03 |
| Vágur | 1.373 | 29,85% | 2.657.858,18 |
| Hvalba | 652 | 14,17% | 1.262.143,87 |
| Sumba | 334 | 7,26% | 646.558,36 |
| Porkeri | 322 | 7,00% | 623.328,72 |
| Hov | 106 | 2,30% | 205.195,17 |
| Fámjin | 78 | 1,70% | 150.992,67 |
| 4.600 | 100,00% | | 8.904.696,00 |

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2024**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað. -málið verður beint í býráði

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt, kunna og einmælt samtykt

## 79/23
## 23/00308-1 Fíggjarætlan 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 44/23 |
| 2 Býráðið | 28.09.2023 | 53/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 60/23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 30.11.2023 | 84/23 |
| 5 Býráðið | 30.11.2023 | 79/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 18.09.2023)**
Mælt verður til at Fíggjarætlan "FÆ2024" verður viðgjørd av Tvøroyrar býráð sum niðanfyri:

- 28. September, 1. viðgerð av fíggjarætlan "FÆ2024", har ásett verður barnafrádrátt og skattaprosent fyri 2024.

- 30. November, 2. viðgerð og endalig viðgerð av "FÆ2024"

Samb. Fráboðan frá TAKS, er skattainntøkur fyri 2024 mettar at blíva: **kr. 66.963.153,-**

Inntøkugrundarlagið er grunda á:
- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. -7.000,-
- P/F skattur kr. 2.0 mió.

## Skattagrundarlag:

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | 368.925.700,- | |
| B-Inntøka: | 19.692.300,- | 388.618.000 |
| | | |
| FAS-Inntøka: | (-6.987.393,-) | |
| Inntøkufrádr.: | (-805.600,-) | |
| Sjófrádr.: | (-2.360.679,-) | (-10.153.672,-) |
| Skattskyldug inntøka: | | 378.464.328,- |
| Botnfrádráttur: | | (40.253.070,-) |
| | | |
| **Inntøkugrundarlag:** | | **338.211.258,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | 70.686.153,- | |
| Barnafrádráttur: (384 x 7.000,-) | (-2.688.000,-) | |
| Pensionistafrár: (345 x 3.000,-) | (-1.035.000,-) | |
| **Netto A-skattur:** | | **66.963.153,-** |
| P/F Skattur: | 2.000.000,- | 2.000.000,- |
| | | |
| **Mettar inntøkur í alt (2024)** | | **68.963.153,-** |

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
  - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember****.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt at áseta fyri 2024 kommunuskatt á 20,9% og barnafrádráttur á kr. -7.000,-

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttur á kr. -7.000,- fyri 2024.

**Kommunustjórin 18. okt. 2023:**
Mælt verður til at áseta ein temadag at viðgerða fíggjarætlanaruppskot fyri 2024, sum verður lagt fyri býráðsfund tann 30. nov. til samtyktar .

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Kristin Michelsen mælir til, at avseta 16, 17 og 18 november til arbeiðsdagar har alt býráðið er savna at viðgerða fíggjarætlanina fyri 2024. Einmælt samtykt.

## Kommunustjórin 20. november 2023:

Á temadagi 16. nov. har allir býráðslimir saman við kommunustjóra, fíggjarleiðara og leiðara av tekniskudeild og starvsfólkum í umsitingini, varð fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu 2024 viðgjørd.

Viðgerðin tók støðið í samtyktini á býráðsfundinum 28. september 2023, har karmarnir fyri inntøkumetingar, skattaprosent og frádráttir vóru lagdir sum grundarlag fyri rakstur og íløgur fyri 2024, og í tilfari frá stovns- og deildarleiðarum hjá Tvøroyrar kommunu.

Nýggjar skattainntøkumetingar eru síðani greinaðar við støði í tølum frá TAKS og Føroya Gjaldsstovu:

Á temadøgum bleiv mælt til, at skattaprosentið verður eins og undanfarna ár, 20,9%. At Barnafrádrátturin hækkar við kr. 1.000,- úr kr. 7.000,- til kr. 8.000,-. At hildið verður áfram við at lata virðiskort á kr. 2.000, til øll børn í Tvøroyrar kommunu, ið tey kunna brúka sum ískoyti til luttøku til mentan- og ítróttar tiltøk.

Á temadøgunum var avrátt at avseta kr. 30 mio til íløgur 2024, í mun til játtanina í 2023, sum var 26 mió., ið svarar til eina øking á kr. 4 mió.

At barnaansingar-gjaldið verður framhaldandi tað sama fyri vøggustovu- og barnagarðspláss kr./mnd. 1.900,-, annað barnið kr./mnd. 1.600,- og ókeypis fyri triðja barni og hareftir. Gjaldið fyri fyrsta barni í frítíðarskúlanum verður framhaldandi kr. 1.200,-/mðr., og goldið verður fyri 11 mðr.

Nú Tvøroyrar kommuna á sumri 2023, byrjaði at bjóða børnum í kommununi tilboð at ganga í forskúla, varð mælt til at luttøku gjaldið fyri fyrsta barni verður kr. 700,-/mðr. og goldið verður fyri 11 mðr. Avsláttur verður latin javnbjóðis galdandi avsláttarskipan fyri barnaansingina.

Inntøkurnar komandi ár eru samanlagt mettar til kr. 92,5 mió, svarandi til eina minking á kr. 0,6 mio í mun til FÆ2023, har samlaða inntøkan var mett til kr. 93,1. Inntøkurnar av persónsskatti eru kr. 68,9, ið er ein minking á kr. 0,5 mio. Samanborði við 2023, har persónskatta inntøkan var kr. 69,4 mió.

Inntøkur av partafelagsskatti verða mettar til kr. 2,5 mió. Skattur av DIS og FAS eru mettur til kr. 4,6 mió. Skattur av eftirlønargjøldum er mettur blíva kr. 22 mio.

### Greiningar:

| | | |
|---|---|---|
| Skattur: **2023** | 338.080.511,00 | 70.658.827 |
| Barnatal 396 | 7.000 | -2.772.000 |
| Pensionistafrádráttur 346 | 3.000 | -1.038.000 |
| | persónsskattur | 66.848.827 |
| | P/F skattur | 2.500.000 |
| | íalt | 69.348.827 |
| Skattur: **2024** | 335.524.995,00 | 70.124.724 |
| Barnatal 385 | 8.000 | -3.080.000 |
| Pensionistafrádráttur 345 | 3.000 | -1.035.000 |
| | persónsskattur | 66.009.724 |
| | P/F skattur | 2.500.000 |
| | íalt | 68.509.724 |

### Rakstur:

| | **FÆ2023 Rakstur** | **FÆ2024 Rakstur** | |
|---|---|---|---|
| §1 | 10.759.709 | 10.854.412 | 94.702 |
| §2 | 30.443.270 | 33.474.329 | 3.031.059 |
| §3 | 15.705.459 | 16.921.767 | 1.216.308 |
| §4 | 8.539.511 | 8.630.424 | 90.914 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §5 | 10.347.041 | 10.400.141 | 53.100 | |
| §6 | 6.107.664 | 6.062.869 | -44.796 | |
| §7 | 3.690.525 | 3.933.600 | 243.075 | |
| | 85.593.180 | 90.277.543 | 4.684.363 | *5,47%* |

**Íløgur ætlanin at fremja í 2024:**

| | FÆ2023 Íløgur | FÆ2024 Íløgur | | |
|---|---|---|---|---|
| §1 | 215.000 | 850.000 | 635.000 | |
| §2 | | | 0 | |
| §3 | 2.100.000 | 800.000 | -1.300.000 | |
| §4 | 3.250.000 | 2.405.000 | -845.000 | |
| §5 | 4.750.000 | 895.000 | -3.855.000 | |
| §6 | 10.835.000 | 19.605.000 | 8.770.000 | |
| §7 | 4.855.000 | 5.425.000 | 570.000 | |
| | 26.005.000 | 29.980.000 | 3.975.000 | *15,29%* |

**Inntøkur og skuld**

| | FÆ2023 Rentur + Inntøkur | FÆ2024 Rentur + Inntøkur | | |
|---|---|---|---|---|
| §20 | 825.000 | 1.300.000 | 475.000 | Rentustuðul |
| | 640.000 | 1.707.468 | 1.067.468 | Rentur |
| | -25.163.000 | -26.621.000 | -1.458.000 | Afturbering eldraøkið |
| | -69.348.827 | -68.509.724 | 839.103 | Skattur og avgjøld við 20,9% |
| | -93.046.827 | -92.123.256 | 923.571 | |

| 2023 ultimo | 2024 | |
|---|---|---|
| | -1.845.714 | Úrslit frá Rakstri |
| | 3.674.000 | Avdráttur lán |
| | -23.500.000 | Útvegan lán |
| | 29.980.000 | Løgur |
| 0 | 8.308.286 | Kassaúrslit |

| 2023 ultimo | 2024 | |
|---|---|---|
| 9.495.000 | 9.495.000 | Tøkur peningur d.d. |
| | -8.308.286 | Rest at fíggja |
| 9.495.000 | 1.186.714 | |

| 2023 ultimo | 2024 | |
|---|---|---|
| 2.976.161 | 2.976.161 | Goymslur og áogn |

| | | | |
|---|---|---|---|
| -50.186.948 | -70.012.948 | -19.826.000 | Langfreistað skuld |
| -5.103.846 | -5.103.846 | | Stuttfreistað skuld |
| -42.819.633 | -70.953.920 | | |

**Hetta svarandi til álíkning á 0,68**

**Tilmælið 30.11.2023:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til aðru og endaligu viðgerð og samtykt.

**Fíggjarnevndin 30. november 2023:**
Einmælt samtykt fíggjarætlan sum fyriliggjandi fyri 2024. -málið verður beint í býráði

**Býráðið 30. november 2023:**
Einmælt samtykt fíggjarætlan sum fyriliggjandi fyri 2024, við aðru og endaligu viðgerð.

**80/23**
**21/00593-3 Uppskot til reglugerð í sambandi við útleigan av ítróttarhúsinum við Stórá**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 84/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.09.2023 | 75/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 48/23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 81/23 |
| 5 Býráðið | 30.11.2023 | 80/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10. Okt. 2021)**
Forkv. í Mentanarnevndini eftirlýsir reglugerð fyri húsið við Stórá. Upplýsast skal, at uppskot til reglugerð er skriva og viðgjørd á fundi í Mentanarnevndini 1. Nov. 2017, har samtykt var at:

- *Mentanarnevndin samtykti, at ítróttarhúsið við Stórá ikki skal leigast út, men skal brúkast av ítróttarfeløgum í kommununi burturav. Verandi uppskot til reglugerð verður dagført samsvarandi hesum.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2021-**
*Fíggjarleiðarin hevði viðmerking (2017) til uppskot um leigukostnað á kr/t. 200,-:*

> *"Haldi at handan upphæddin verður trupul at umsita, betur er at hava eina fasta upphædd fyri tiltakið, tí ringt er at vita hvussu nógvar tímar tey skulu brúka t.d. til ein føðingardag og tá tey skulu vaska aftaná tiltakið, kann man áseta at lykilin t.d. skal avleverast á middegi dagin eftir í seinasta lagi"*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndina og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Málið verður tikið upp til viðgerðar á næsta fundi í Mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 12. september 2023:**
Mentanarnevndin mælir til ikki at útleiga húsið við Stórá.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Borgarstjórin mælir til at húsið við Stórá verður avmarkað útleiga til barnadóp og konfirmatión.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá borgarstjóranum: Fyri eru Kristin Michelsen, ímóti eru Jónleyg J. Bech og Bjarni Hammer –uppskotið fallið
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Mentanarnevndini: Fyri eru Jónleyg J. Bech og Bjarni Hammer; ímóti eru Kristin Michelsen –uppskotið samtykt

**Kommunustjórin 24.11.2023**
Borgarstjórin hevur heitta á kommunustjóran um at seta málið á skrá av nýggju, nú fyrisp. er komin frá almennum stovni um at leiga part av húsinum við Stórá til samrøður 3-4 um ári. Eisini ynskir borgarstjórin at støða verður tikin til nýtslurættin hjá feløgum, ið húsast í húsinum við Stórá, m.a. hvat húsið kann nýtast til.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at borgarar í Tvøroyrar kommunu fáa atkomu og loyvið til at nýta húsið við Stórá til merkisdagar sum ferming og barnadóp, í samráð við húsavørðin og feløg sum hava sítt virksemið í húsinum. Heitt verður á umsitingina um at orða reglugerð fyri felagshúsið við Stórá.

**Býráðið 30. november 2023:**
Fyri eru: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Kristina Roest og Eyð Eidesgaard.
Ímóti: ongin
Blankt: Anita Vibergsdóttir og Jónleyg J. Bech
Tilmælið frá fíggjarnevndini 28. nov. 2023 er harvið samtykt

**81/23**
**23/00363-1 ALS -hølir til samrøður**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 82/23 |
| 2 Býráðið | 30.11.2023 | 81/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 17.11.2023**
ALS hevur vent seg til umsitingina við fyrisp. um kommunan hevur hølir, ið ALS kann brúka uml. 4 ferðir um ári til samrøður við teirra viðskiftafólk í Suðuroynni.

Umsitingin hevur víst á nakrar møguleikar, og hevur ALS eftirfylgjandi roynt at hava samrøður í Faktorhúsinum. ALS metur tó at hølini við Stóra eru beri og sera væl egna til teirra tørv. Fyribils avtala er gjørd við ALS um at royna samrøður við Stórá, í samráð við umsjónarmannin.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til kunning/støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at loyva ALS at nýta felagshúsið við Stórá til teirra virksemið, í einar royndar tíð uppá eitt ár, til endan av 2024. Hetta í samráð við húsvørðin og feløg sum hava sítt virksemi í húsinum. Heitt verður á umsitingina at orða reglugerð fyri felagshúsið við Stórá við einari gjaldsskrá .

**Býráðið 30. november 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**82/23**
**21/00027-5 Dugni í Suðuroy**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 11.05.2021 | 14/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 33/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 80/23 |
| 4 Býráðið | 30.11.2023 | 82/23 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.05.2021)**

Dugni hevur avgjørt at seta á stovn deild í Suðuroynni, og hevur í hesum sambandi sett deildarleiðara og starvsfólk í starv.

Kommunustjórin og borgarstjórin hava í hesum sambandi samskift við stjóran á Dugna, og mæla til at starvsfólk hjá Dugna í Suðuroynni fær atgongd til skrivstovu og goymslu hølið hjá Tvøroyrar kommunu fyri at koma í gongd við virksemið.

**Sosiala nevnd 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. maj 2021:**
Kristin Michelsen mælir til at Dugni fær innivist hjá Tvøroyrar kommunu fyribils til 31.12.2020. Har eftir verður málið tikið upp til nýggja viðgerð.
Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 2. nov. 2023:**
Dugni hevur fráboða, at tey ynskja at koma suður 15. nov, at møtast við TVK, fyri at endurskoða teirra staðseting í Suðuroynni, við atliti til at leiga hølir til teirra virksemið í Suðuroynni... Upplýst verður, at virksemið hjá Dugna í Suðuroynni, er komið á fíggjarlógina, og er ynskið hjá leiðsluni í Dugna, at leiga hóskandi hølir í Suðuroynni, og harvið fáa støðugar og fastar karmar at húsast.

Dugni hevur eftir vitjan hjá Tvøroyrar kommunu hin 15. nov. sent eina umsókn um leigu av Pakkhús 5 til virksemi við endurbúgving, og er ynskiligt at flyta inn í karmarnar 01. Jan 2024.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Einmælt samtykt at borgarstjórin samskiftir við Dugna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinnum fundi.

**83/23**
**23/00364-2 FSR -viðv. stuðulsavtaluni frá 15.10.2021 -útgjald**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.11.2023 | 90/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 79/23 |
| 3 Býráðið | 30.11.2023 | 83/23 |

**Málslýsing: Kommunsutsjórin 20.11.2023**
Umsókn um rest útgjald er móttikið frá FSR, til neystabýgging.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2023**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 20. november 2023:**
Linn Augustinussen, form. í FSR møtti á fundinum, og greiddi frá um verkætlanina at byggja nýtt neyst á Hvítanesi. Upplýst var at metti kostnaðurin verður kr. 12.5 mió. við øllum.
Bjarni Hammer mælir til at leysgeva játtanina hjá Tvøroyrar kommunu samb. fyriliggjandi avtalu, og at bygginevndin møtur til fund har kunna verður um verkætlanina, og at viðgerða meirkostnaðin.
Einmælt samtykt. -Málið verður beint í Fíggarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Einmælt samtykt at leysgeva seinastu ætlaðu játtan hjá Tvøroyrar kommunu til bygging av nýggjum neysti á 1. mió. samb. stuðulsavtaluna millum TVK og FSR á depotkonto.

**Býráðið 30. november 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**84/23**
**23/00370-2 SEV -kallar til eykaaðalfund 8. desember 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.11.2023 | 84/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27. Nov. 2023**
SEV -kallar til eykaaðalfund 8. desember 2023 á Hotel Hilton, har allir býráðslimir hava møti rætt.

SEV skrivar vísandi til § 3 í viðtøkunum, verður við hesum boðað til eykaaðalfund í SEV fríggjadagin, 8. desember 2023, kl. 9:30 á Hotel Hilton, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. *Val av fundarstjóra*
2. *Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi síðani ársaðalfundin*
3. *Kunning frá nevndini um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin*
4. *Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar*
5. *Uppskot frá nevndini um endurnýgging av loyvi/heimild til, at SEV kann gera broytingar í teimum til eina og hvørja tíð verandi lániavtalum hjá SEV*
6. *Uppskot frá Tvøroyrar kommunu um val av nýggjum varalimi fyri nevndarlimin fyri Suðuroy.*
7. *Kunning frá nevndini um verkætlanina viðvíkjandi pumpuskipan v.m. nevnd "Mýruverkið II".*

Til støðutakan hjá Tvøroyrar býráð:

- Fulltrú at møta, taka orðið og atkvøða á eykaaðalfundinum hjá SEV fríggjadagin, 8. desember 2023.

**Umboð í SEV fyri Tvøroyrar kommunu eru**

*Fastur limur / (tiltakslimur)*
Alvi Mortensen /Anita Vibergsdóttir

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan/kunning.

**Býráðið 30. november 2023:**
Borgarstjórin mælir til, at Alvi Mortensen fær fulltrú at atkvøða vegna Tvøroyrar kommunu. Einmælt samtykt.

**Til kunningar**

## 23/23
## 23/00077-2 Staðseting av fongsul -fyrisp. frá Løgmálaráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 23/23 |
| 2 Býráðið | 30.11.2023 | 23/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.03.2023**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. frá Løgmálaráðnum, ið hevur sent áheitan til allar kommunur í Føroyum, um at vísa á hóskandi staðseting av einum føroyskum fongsul, ið SVM-stjórnin hevur í sínum samgonguskjali frá desember 2022 staðfest, at danska stjórnin fer at arbeiða fyri, at nýggja føroyska fongslið verður liðugt í 2029, t.v.s. eitt ár fyrri enn sambært ætlanaryvirlýsingini. Við nýggja fongslinum kann væntast, at so at siga allir føroyingar, ið verða dømdir fongsulsrevsing, kunna sita revsingina í Føroyum.

**Løgmálaráðið (Løgmaður) kunnar um at:**

- Sum tað allarfyrsta mugu danska stjórnin og Føroya landsstýrið tó koma ásamt um staðsetingina av nýggja fongslinum.

- Danska kriminalforsorgin hevur í hesum sambandi gjørt eina kravfesting, sum møguligar staðsetingar mugu lúka. Til dømis er tað eitt krav, at byggiøkið í minsta lagi er 40 til 80 túsund kvadratmetrar til víddar. Eisini eru onnur staðfrøðilig krøv til økið, umframt krøv til veðurlagið í økinum, fjarstøða til bygt økið, almennar flutningstænastur v.m.

- Kommunurnar koma við uppskotum Eg (løgm.) haldi, at tað eru kommunurnar sjálvar, sum kenna best til lendið í teimum einstøku kommununum kring landið. Tí eru tað eisini kommunurnar, sum best kunnu meta um, hvørji økir lúka treytirnar í kravfestingini frá danska løgmálaráðnum. Eg haldi tað tí vera skynsamt at geva kommununum møguleika at koma við uppskotum til, hvar nýggja fongslið skal staðsetast. Eg fari tí vinaliga at heita á allar kommunur í landinum um at kanna og koma við uppskotum til økir, sum lúka donsku kravfestingina, og sum kommunurnar meta høvdu hóskað seg til eitt fongsul. Eg fari at heita á kommunurnar um at senda Løgmálaráðnum sítt ella síni uppskot í seinasti lagi tann 1. juni 2023. Føroya landsstýri fer síðani, við støði í uppskotunum frá kommununum, at koma við uppskotum til ríkismyndugleikarnar um, hvar nýggja fongslið kann byggjast. Tað eru tó ríkismyndugleikarnir, sum taka endaliga avgerð um staðsetingina av fongslinum. Løgmálaráðið fer í næstum at skipa fyri einum fundi fyri áhugaðum kommunum, har greitt verður frá ætlanini at byggja nýtt fongsul í Føroyum, og hvussu mannagongdin fer at vera.

Fundur var í Tinganesi hin 14. Mars, har allar kommur vóru bodnar at møta. Tvøroyrar kommuna var umboða av borgarstjóranum, kommunustjóranum og Lassa Jensen virkandi tekniskur leiðara. Har fingu kommunurnar at vita, at tíðarfreistin var 1 juni at koma við uppskotið til staðseting.

Til støðutakan hjá Tvøroyrar býráð er uppskot frá borgarstjóranum, hvørt Tvøroyrar Kommuna skal arbeiða víðari við uppskoti um at ætlanin hjá donsku stjórini at staðseta eitt føroyskt fongsul, at henda staðseting kann verða í Tvøroyrar Kommunu.

**Meira kunning er í bilag frá Kriminalforsorgen**

*Geografisk placering*
Kriminalforsorgen finder det hensigtsmæssigt, såfremt placeringen af en ny institution sker inden for en tidsmæssig rimelig afstand fra Tórshavn, og at der er adgang til offentlig transport. Sidstnævnte såvel af hensyn til personalet som besøgende. Desuden fremgår det, at institutionen ikke bør placeres et sted, som er *særlig* udsat i forhold til de vejrmæssige forhold på Færøerne. Netop de vejrmæssige forhold har skabt udfordringer i den eksisterende institution i Mjørkedal.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt, at heimila borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini.

**Kommunustjórin 2. november 2023:**
Løgmálaráðið hevur hin 31. oktober 2023 boða umsitingini frá, at økini, sum Tvøroyrar kommuna hevur víst á til staðseting av einum komandi Føroysum fongsul, eru ikki millum tey 7 økini, sum hugt verður nærri eftir.

Sagt verður frá, at tað komu tilsamans 11 uppskot, og Kriminalforsorgin kemur í næstum til Føroyar fyri at hyggja nærri at 7 av økjunum.

Grundgevingin fyri at solda uppskotini hjá Tvøroyrar kommunu frá er, at farleiðin við Smyril um Suðuroyarfjørð er ikki mett hóskilig og tryg, fyri mynduleikar, starvsfólk, avvarandi hjá teimum fongslaðu og fangarnar sjálvar.

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**24/23**
**23/00044-1 Skattatøl 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 7/23 |
| 10 Býráðið | 19.06.2023 | 18/23 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 8/23 |
| 12 Býráðið | 28.09.2023 | 20/23 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 11/23 |
| 14 Býráðið | 26.10.2023 | 22/23 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 13/23 |
| 16 Býráðið | 30.11.2023 | 24/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað. -málið verður beint í býráði

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard